# Poul Mohr fyllir fýrs

Hann segði bums nei til samrøðu, tá ið eg ringdi til hann hósdagin og greiddi honum frá, at Sosialurin vildi hava meg at skriva nøkur orð um hann. Nakrar tímar fyrr hevði hann sagt nei til stjóran á Dimmalætting, Árna Gregersen. »Onki interview í samband við mín føðingardag, og túw, hatta passar slett ikki, at eg fylli í morgin, eg fylli ikki fyrr enn einaferð í september.« Nú visti eg, at hann snúgvaði sær undan, tí blaðstjórin á Sosialinum, Eirikur Lindenskov, er næstan autistiskur, tá ið tað snýr seg um føðingardagar og árstøl, akkurát líka sum pápin og hansara klebrihjerni tekur ikki feil av, nær Poul Mohr fyllir.

Og Poul hevur sitið heima fyri tað mesta seinasta mánaðin við skerdum førleika. Hann var so óheppin at detta av hestinum og brákaði sær ein rygggeisla nakað fyri ólavsøku. Hann er í menning nú. Politiið kom av tilvild framvið, tá ið hann var komin aftur á hestin og teir sóu, at okkurt var áfatt. Politiið bjóðaði sær til at koyra hann á skaðastovuna og Poul takkaði nei. »Eg skal ikki koyrast á nakra skaðastovu í salatfati!!!« segði Poul avgjørdur, tí í salatfatið hevur hann ongantíð sitið hesi seinastu 80 árini.

Fólk býta ofta lívið upp í áðrenn og aftan á týdningarmiklar hendingar í lívinum fyri at navigera og kunna seg. Eitt týdningarmikið skifti í mínum lívi var, tá ið eg umvegis Danmark kom til Havnar at búgva í 1976 og trein míni fyrstu varisligu fet í einum blaðhúsi, Dagblaðnum á Traðarvegnum undir leiðslu av Óla Breckmann. Eg búði úti í Hornabø hjá Miu og Jens og sjálvandi tí andektiga gravaranum Amba eisini, dámlig fólk vóru tey. Og tað er í hesum tíðarskeiðinum, at eg komi ísambandviðskipasmiðjuna og komi at eygleiða lívið á hesum virkna arbeiðsplássi morgun og kvøld.

Fjórða skipið hjá Jóhan í Hoyvík, »Váðasteinur« stóð í gerð. Hann var latin eigarunum árið eftir. »Váðasteinur« var eitt nýbrot stílmessiga og bar frá øðrum línubátum, og hann er vakur enn. Tað var ógvuliga áhugavert at síggja, hvussu eitt skip spakuliga tók form. Í drúgva tíð sær tað út sum ein rúgva av jarni, síðan byrjar formurin spakuliga at taka seg út úr øllum jarninum, og tá ið málingin at enda verður sproytað á, er tað sum í ævintýrinum hjá H. C. Andersen um tann ljóta dunnungan, sum umbroytist til vakra svanin. Og í allari hesari processini hoyrdist og sást Poul. Hann var allastaðni sum ein hvirluvindur, og hann hevði fingurin á pulsinum á hvørjum einstøkum av teimum hálvt annað hundrað, sum starvaðust á skipasmiðjuni. Hann var skemtiligur, hann var álvarsamur, og onkuntíð var hann næstan illur, fyri ikki at siga heilt í øðini, hetta var í 1977, og hann var ikki eingang blivin stjóri, stjórasessurin var ikki ledigur fyrr enn tvey ár longur frammi, og í hesum tvey ára tíðarskeiði varð nýggja bedingin gjørd, og hon stendur sum eitt symbol yvir leiðslustílin hjá Poul, og hann kann lýsast við einum setningi, nevniliga fart yvir feltið.

Eg eygleiddi hesa bygging, sum var eitt risatiltak, sum fullkomiliga broytti økið og sum gjørdi sleipistøðina til ein nýmótast sleipistøð. Onkuntíð var eg niðri á sjálvum byggiplássini, og fyrstu orðini, eg hoyrdi Poul siga við meg, ljóða eins klár enn:

»Hvør er túw?«

Ja, hvør eri eg?

Hann stóð í ketildrakt framman fyri meg og eyguni vóru støðugt hjá mær og eisini alla aðrastaðni. Tað kann vera eitt sindur flovisligt hjá einum 19 ára gomlum at siga, hvør hann er. Og eg slapp eisini frá. Eg nevndi, at eg kallaðist Jústinus, og var úr Oyndarfirði og segði Poul restina. Hann kendi væl abba mín, sum eg eri uppkallaður eftir. Hann kendi væl pápa, og hann kendi næstan hvønn einasta oyndfirðing. Og tað var nú ikki so løgi. Tí skipasmiðjan hevði átt »Álaker« í fimmtiárunum og inn í seksti árini, og á hesum skipi var John á Sýnuni í Oyndarfirði skipari, og har vóru nógvir oyndfirðingar við, millum annað fleiri av Guttabeiggjunum, sum John var ein av, og teir fiskaður somikið væl, at »Álaker« legði lunnar undir stállínuskipið »Víking«, sum fór av bakkastokki í Havn í 1962.

Kennskapin millum pápa, abba og Poul hoyri eg um næstan hvørja ferð, eg hitti Poul.

»Túw, abbi tín, sum tú eitur eftir lærdi meg eitt. Hevur tú ein trupulleika, far beint til toppin.«

Lívið hjá Poul hevur verið skipasmiðjan. Hann hevði møguleikan at fara út í heim, hevur stýrimansútbúgving, men arbeiðsplássið, sum pápin legði lunnar undir seinast í tredivinum, eftir at hava fingist við træskipasmíð, síðan hann lærdi niðri undan fyrra kríggið hevði ment seg til nýggjar avbjóðingar hjá hesum framskygna roynda vinnulívsmanni og hjá soninum við.



Poul kom fast á skipasmiðjuna í 1952 og var varamaður hjá Kjartan Mohr í mong ár. 17. mai, sama dag sum nýggja bedingin varð tikin í nýtslu í 1979, við at rækjutrolarin Sólborg varð tikin upp, andaðist Kjartan Mohr, og Poul tók við sum stjóri.

Nýggja bedingin setti ferð á umvalingararbeiðið. Nýggju vognurin, sum varð keyptur úr Norra var nútímans, hydrauliskur og ógvuliga tíðarsparandi. Okkurt árið hava 220 skip verið tikin upp, og miðaltalið hevur ligið um 160. Og hóast stjóri, so hevur Poul sjálvur verið við til at tikið túsund tals skip upp. Ketildraktin hevur verið meira nýtt enn klæðningurin.

Ein rørandi mynd yvir ein sjónligan leiðara, sum ikki goymir seg á eini skrivstovu ella aftan fyri ein skrivara er júst Poul. Eg eygleiddi hann mangan á ferðini til gongu frá Miu í Hornabø og niðan á Traðarvegin, meðan hann heilsaði hvørjum einasta, sum starvaðist á skipasmiðjuni góðan morgun. Tað vóru ikki altíð so nógv orð, men har var eygnakontakt og eitt ekta møti millum fólk tørvar ikki altíð orð, og orð vóru eisini. Tað eru nógvar skemtiligar anekdotur frá morgunheilsanini hjá Poul, og tær kann ein møguligur lesari minna seg aftur á nú.

Eg hevði tað stóra fornøjilsi at fáa vitjan av Poul Mohr, tá ið eg starvaðist í Singapore. Teir høvdu bygt ein nýbygning til Thailands, og Poul fleyg til Singapore og kom umborð har. Hetta vóru festligir dagar, og so skjótt hann var komin umborð, var hann aftur stjórin í ketildraktini, sum hoyrdist um alla redina og sum var í støðugum sambandi við sonin Gunnar heima í Føroyum. Her var næsta og triðja ættarliðið í familjufyritøkuni í gongd úti í stóra heimi. Og hóast Poul, heldur enn eg, dugi eitt orð av kinesiskum, so var hansara kroppsmál so týðuligt, at sjálvt kinesisku fergumenninir, sum tosaðu hokkien ella mandarin, skiltu hann sum einki.

Nú er skipasmiðjan á øðrum hondum, og virðið hon skapti, andar upp og niður við kursum á partabrøvum sum viðurskiftir úti í heimi hava ávirkan á. Og júst hetta hevur ikki verið tað mest spennandi seinastu tíðina við svárari búskaparkreppu. Og skipasmiðjan heldur fram, skip verða tikin upp, og fólk fara enn til arbeiðis. Hon livir víðari, og uttan mun til hvørjar nevndarsessir Poul situr í dag, so hevur hann brent seg fastan í tilvitskuna hjá føroyingum sum ein tann dugnaligasti vinnulívsmaður, vit nakrantíð hava átt.

Og so hevur hann dugað at brúkt gávuna frá Gudi, nevniliga, at lívið behøvist ikki at vera keðiligt, trist og lívsfornoktandi, so skjótt tú fær ábyrgd op pengar. Tú sær hann í dansi, tú sær hann í vertskapi, tú sær hann á hestbaki, og tað lætta er í hvussu er tað dominerandi, hóast tað eru álvarsting hann fæst við.

Eg gleði meg at hitta hann sum reiðmann á rossavegnum í Havnadali á mínum rennitúrum, og eg veit, at hann steðgar og hevur stundir til eitt prát.

P. S. Takk, Jógvan Arge fyri bókina Tórshavnar Skipasmiðja 50 ár, tá ið Poul ikki vildi ganga við til samrøðu, hava upplýsingarnir í bókini verið hentir fyri hesa heilsan.

Hjartaliga tillukku við degnum.

**Heilsan**
**Jústinus Leivsson**
**Eidesgaard**
**justinus@olivant.fo**

# Stuttsøga við refleksión

HERI MOHR



Í mínum grannalagi búði fyri fleiri árum síðani ein sera dámligur og dugnaligur kemiskur civilingeniørur útbúgvin á Polyteknisk Læreanstalt í Keypmannahavn.

Eftir seinna verðinskríggj (1939-1945) fór hesin civilingeniørur saman við øðrum skilamonnum at framleiða kjøtextrakt úr stórhvalatvøsti.

Teir stovnaðu P/f Kemiskvirki, sum helt til í einum laboratorii norðuri við Áir. Eftir drúgva tíð við nógvum kemiskum og matematiskum formlum var arbeiðið komið so langt, at produktið – tjúktflótandi sum svørt tjøra – kundi fara á marknaðin um okkara leiðir í smáum tubum við skrúvuproppi.

Men so tóku álvarsligir tupulleikar seg upp.

Av tí at søluliðið kravdi, at deklaratiónin ikki skuldi upplýsa nakað um, at vøran var framleidd úr stórhvalakjøti, og P/f Kemiskvirki ikki helt, at tað var ráðiligt, at "spæla við duldum kortum" í so álvarsligum máli – og stórhvalatvøst fyri alt tað var kanska betri rávøra enn neytakjøt – fekk projektið sølubana.

Spell, at hetta pionérarbeiðið so skammiliga varð forkomið av stuttskygdum og óhepnum sølumonnum.

Umrøddi civilingeniørur, cand.polyt., kundi í góðum vertskapi skemtiliga taka til, at hann var Føroya fyrsti kemiski senilingeniørur.

Ein slíkur engstrømskur humor kundi valla verið framborin við orðunum: verkfrøðingur, evnafrøðiligur og ellíomegd.

Um vit ímynda okkum, at hendan stutta endurminning skuldi verið søgd við orðum, sum ikki natúrliga eru komin í okkara mál, men heldur ósmæðið eru lirkað á okkara tungu, sum talar, og okkara hond, sum skrivar, so høvdu vit lisið eina stuttsøgu við afturskini um eitt evnafrøðisvirki við rannsóknarstovu (ein lítil kroysa) við nógvum evnafrøðiligum og støddfrøðiligum frymlum, um ein evnafrøðisverkfrøðing útbúgvin á margtáttaðum náttúrufrøðiligum háskúla í Keypmannahavn og um evnislýsing av stórhvalaúrdrátti í smáum kramarhúsum við skrúvutøppi.

Sjúrður Skaale! – Næstan allir føroyingar eru tær takksamir fyri, at tú hevur tikið stig til við lóg at bjarga okkum ABC'ið og harvið eitt livandi og væl skiljandi skriftmál. (Tá verður ikki neyðugt hjá føroyingum at fara av landinum fyri at sleppa á wc – stytting av tí enska water-closet – og ørvitisorðið vesi man fara at hvørva. Løgið at puritanararnir ikki hava navnabroytt ta ensku HP-sósina til HÁPI-dypp.)

Næsta stigið verður ætlandi at fáa nýggjar abctalvur og nýggjar bøkur og orðabøkur til skúlabrúks.

Spell, at vit í 1993 skuldu fáa eitt ónýtiligt heimsatlas við landa- og býarnøvnum ryggbrotin av einum amputeraðum alfabeti: Chile (Kili), Mosambique (Mosambik), New Guinea (Nýguinea), Taiwan (Teivan), New Zealand (Nýsæland), Zimbabwe (Simbabvi) o.s.fr.

Og kortini, knívurin skar ikki allastaðni; eitt nú broyttist New York ikki til Nýjork ella Newcastle til Nýborg.

Hetta heimføðisliga atlasið er ónýtiligt í skúlunum, har børnini skulu læra at lesa og stava beint.

Løgið, at lingvistar, serkønir í føroyskari fonologi, fara út í stóru verð at jakstra og týna 6 bókstavir, men gloyma at strika hesi somu hundraðtals C, Q, W, X, Z í okkara telefonbók.